NUMO

Løggilt grannskoðanarvirki Sp/f

## Greining av línuskipunum 2011 til 2015

Greiningin fevnir um línuskipini yvir 110 tons samsvarandi flokkingina í lógini um vinnuligan fiskiskap.

Grundarlagið er almennu ársfrásagnirnar fyri skipini umframt útvegaðar upplýsingar um veiðinøgd, manningartal, nettosølu v.m.

Við støði í roknskapunum og upplýsingum fyri skipini í einstøku skipabólkunum fyri árini 2011 til 2015 eru sett upp høvuðstøl, umframt lyklatøl, sum nærri lýsa aktuellu støðuna tey einstøku árini.

Harumframt eru lyklatøl, sum kunnu geva ábendingar um, hví gongdin er, sum hon er. So sum lyklatøl fyri virðisøking og EBITDA relaterað til pr. mann, pr. tons, pr. dag o.s.fr. EBITDA er úrslit áðrenn rentur, avskrivingar og skatt.

Greiningin er ætlað at geva skipaeigarum, lánistovnum og myndugleikum høvi til sjálvi at gera sínar niðurstøður, ella geva høvi til víðari útgreiningar, fyri at hava eitt gott búskaparligt grundarlag, tá avgerðir verða tiknar.

Lyklatøl um rakstur og fíggjarviðurskiftir pr skip í miðal:

| **Ár** | **2015** | **2014** | **2013** | **2012** | **2011** |
|---|---|---|---|---|---|
| Skipatal | 14 | 14 | 12 | 17 | 16 |
| Veiða t | 975 | 902 | 986 | 859 | 849 |
| Søla fyri árið tkr | 15.503 | 12.154 | 10.979 | 10.978 | 10.805 |
| Miðalprísur kr/kg | 15,90 | 13,47 | 11,14 | 12,77 | 12,73 |
| Dagar á fiskileið | 239 | 222 | 235 | 228 | 231 |
| EBITDA pr mann tkr *) | 132 | 79 | 49 | -10 | 59 |
| EBITDA pr kg *) | 1,87 | 1,20 | 0,68 | -0,17 | 0,96 |
| Ársúrslit tkr **) | -397 | 403 | -1.012 | -756 | -543 |
| | | | | | |
| Gjaldførisstig 1 | 0,3 | 0,6 | 0,6 | 0,6 | 1,1 |
| Soliditetsstig | 11% | 14% | 7% | 4% | 9% |
| | | | | | |
| Bankaskuld/EBITDA *) | 5,05 | 10,06 | 19,31 | -*) | 15,63 |

*) EBITDA er negativt í 2012. Tí kemur sostatt einki gjaldføri frá rakstrinum í 2012 at rinda rentur, avdráttir og aðra skuld við.

**) Í 2015 hava línuskip tapt áogn á 9 mió. kr, meðan í 2014 og 2012 hava línuskip fingið eftirgivið skuld á ávíkavist 10 mió. kr. og 24 mió. kr.

Línuskipini hava árini 2011 til 2013 í meðal havt undirskot. Úrslitið í 2014 batnaði munandi og gjørdist positivt, meðan tað aftur gjørdist negativt í 2015. Orsøkin til bøtta úrslitið í 2014 er serliga fíggjarinntøkur hjá onkrum skipum og generelt hægri miðalprísur.

Tað er stór spjaðing í úrslitunum í 2015, okkurt av vanligu línuskipunum kláraðu seg hampuliga væl, og serliga frystilínuskipini kláraðu seg væl. Eingangsútreiðslur høvdu við sær, at meðalúrslitið gjørdist negativt. Lyklatølini fyri raksturin vísa tó, at raksturin hevur roynst betur í 2015 enn í 2014.

Fyrstu 6 mánaðirnir í 2016 hevur avreiðingarvirðið roynst heldur frægari enn sama tíðarskeið í 2015.

Línuskipini eru undir fiskidagaskipanini, og flestu hava íslandskvotu umframt møguleika at fiska við Flemish Cap og Grønland.

Hesin parturin av flotanum hevur nógv fólk í arbeiði, og er eisini grundarlag fyri týðandi vinnu á landi, og hevur potentiali fyri at landa fisk av serliga høgari góðsku.

Eitt opið føroyskt hav kundi verið við til at ment hendan partin av flotanum, skilt á tann hátt, at møguligt kundi verið at útvega sær veiðiloyvir, ið hóska til hendan fiskiskapin, á øllum teimum økjum, har landið hevur ræði á fiskirættindum. Hetta hevði eisini – sum víst á omanfyri – havt stóran týdning fyri víðari virkingina av fiski á landi.

Frystilínuskipini kunnu fiska víða hvar og hava fingið ella útvegað sær møguleika at fiska aðrastaðir enn við Føroyar ella nærhendis Føroyum og eru dømir um, at eitt opið føroyskt hav virkar væl.

Niðanfyri sæst hvussu EBITDA og Veðskuld + bankaskuld pr línuskip hevur broytt seg undir fiskidagaskipanini, sum varð sett í gildi í 1996.

